# Almannamálaráðið

**Lógartænastan**

Dagfesting: 9. juli 2020
Mál nr.: 20/00545-4
Málsviðgjørt: EM
Eftirkannað: Lógartænastan dagfestir

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um samsýning til fosturforeldur**
(Lummapeningur)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 69 frá 19. mai 2006 um samsýning til fosturforeldur, sum broytt við kunngerð nr. 159 frá 13. desember 2018, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 1, stk. 3 verður orðað soleiðis:
“*Stk. 3.* Eisini verður eitt fast gjald um vikuna rindað til lummapening til barnið. Tá ið barnið er:
1) 3-10 ár er gjaldið 32 kr.
2) 11-13 ár er gjaldið 68 kr.
3) 14-15 ár er gjaldið 136 kr.
4) 16 ár og eldri er gjaldið 274 kr.”

**2.** § 2, stk. 2 verður orðað soleiðis:
“*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kunnger javnaðu gjøldini í rundskrivi í seinasta lagi 1. januar á hvørjum ári.”

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi 1. januar 2021.

Almannamálaráðið, 9. juli 2020

**Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur**
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen